# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Nú má eg arbeiða út frá tí, sum eg havi við mær í toilett-taskuni*
*Sølvi Winther Olsen, oyggjaleikalækni*




# 30.000 fagnaðu Thierry Henry

**Thierry Henry varð sera væl móttikin, tá ið hann mánadagin á fyrsta sinni kom á Nou Camp**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Tað tóktist greitt beinanvegin, at FC Barcelona-viðhaldsfólk eru ovurfegin yvir at Thierry Henry er komin til felagið. Heili 30.000 viðhaldsfólk vóru savnað saman á Nou Camp, tá ið hann júst hevði skrivað sáttmálan.

### Drúgvar samráðingar

Tað ljóðaði leingi, at Henry var ávegis til FC Barcelona. Hetta vildi felagið tó ikki vátta, og Thierry Henry sjálvur vísti hesum aftur fleiri ferðir. Men so við og við vórðu fleiri upplýsingar at finna, eitt nú at næstovastin í FC Barcelona, Ferran Seriano, var sæddur í London saman við venjaranum hjá Arsenal, Arsene Wenger.

Sunnukvøldið kom so boðini, ið øll høvdu bíðað spent eftir. Arsenal gav boð frá sær, og boðini fóru, at samráðingarnar um Thierry Henry vóru komnar á mál, og tær vóru væl eydnaðar. Mánadagin kl.17 føroyska tíð varð Thierry Henry so vístur fram á Nou Camp, har hann samstundis bar nýggju troyggjuna hjá FC Barcelona, sum var har av sama endamáli sum hann sjálvur.

### Vil vinna Champions League

Henry er sera málrættaður, nú hann er komin uppá pláss í spanska stórfelagnum.

– Eg havi sera góðan hug at vinna Champions League. Tað er ein dreymur fyri hvønn einasta fótbóltsleikara, og tað er eitt mál eg gjarna vil røkka her, tí at vinna Champions League er tað einasta eg mangli sum fótbóltsleikari, segði franski landsliðsáleyparin við tey næstan 200 fjølmiðlafólkini, sum vóru komin saman á Nou Camp.

Tað var ein sera kensluborin Henry, sum mánadagin segði farvæl við Arsenal, har hann hevði leikt síðan 1999. Hetta forðar honum tó ikki í at vera sera glaður fyri at leika fyri FC Barcelona.

- Fyrst av øllum vil eg takka ovastanum, ítróttarliga ovastanum og Frank Rijkaard. Teir hava gjørt, at eg standi her í dag. Eg eri sera glaður fyri at vera her, og eg fari at gera alt fyri felagið, segði Thierry Henry.

### Finnast at Arsenal

Tað er ikki júst dagsins koppur av kaffi hjá Arsenal-viðhaldsfólkunum, at felagið hevur latið sín stuðulspælara fara. Heldur ikki er ein fyrrverandi stórspælari hjá Arsenal nakað fyri hesi sølu.

– Henry er tann besti spælarin, ið eg havi sæð í Arsenal. Arsenal má sigast at vera í einari lítlari kreppu fyri tíðina, sigur 65 ára gamli Bob Wilson, sum hevur vunnið bæði bestu deildina og FA Cup við Arsenal.

### Venjaraskifti?

Fáur venjari er so væl lýddur millum viðhaldsfólk, sum Arsene Wenger er í Arsenal. Wenger byrjaði í starvinum í 1996, og hevur trúðfastur staðið á odda fyri liðnum í betri og verri tíðum. Hann hevur sáttmála við Arsenal komandi kappingarár afturat, og nógv bendir á, at hetta gerst seinasta kappingarár hjá fransmanninum í Arsenal.

Sambandið millum Wenger og leiðsluna í felagnum viknaði í fjør, tá ið ein nevndarlimur og besti vinmaður hjá Wenger, David Dein, í fjør fekk sparkið frá felagnum. Sambandið gjørdist ikki stórt frægari, tá ið Wenger í ár hevði Nicolas Anelka uppá tal sum avloysari fyri Henry. Anelka hevur fyrr verið í felagnum, og hesum hevur leiðslan í felagnum als ikki síni bestu minni frá.

# Live Score í føroyskum fótbólti

**Áhugað fáa nú møguleika at nýta eina føroyska Live Score skipan, sum fyritøkan iGlobile hevur ment saman við fótbóltsportalinum f.fo. Henda skipanin gevur brúkarum møguleika at fáa eitt sms-boð, hvørja ferð eitt mál verður skotið í einum formuladysti**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð verður ein føroysk Live Score skipan tikin í nýtslu, soleiðis sum vit kenna tað frá øðrum londum. Tað er føroyska fyritøkan iGlobile sum saman við fótbóltsportalinum f.fo hevur ment skipanina. Skipanin er ein SMS-skipan, sum gevur brúkarum eini SMS-boð, hvørja ferð eitt mál verður skorað í formuladeildini. SMS-boðið sigur brúkaranum, hvat lið hevur skorað, hvør hevur skotið málið, og hvat støðan er í dystinum.

– Stórur tørvur hevur verið á slíkari skipan. Skipanin gevur fótbóltsfjepparum møguleika at fylgja við í øllum dystum í formuladeildini samstundis, sjálvt um brúkarin bert sær ein dyst, sigur Hans Kárason Mikkelsen, sum saman við øðrum hevur ment f.fo.

Skipanin er tó ikki ókeypis. Hvørt SMS-boðið kostar tríggjar krónur, sum brúkarin betalir umvegis telefonrokningina. Til ber at skráseta seg sum brúkara á www.f.fo.